Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

7. august fingu Elisabeth og Dan Petersen, Oyndarfjørður, ein son. Hann var 46 cm. og vigaði 2480 gr.

12. august fingu Marita Mortensen og Eliesar Hansen, Øravík, ein son. Hann var 57 cm. og vigaði 4800 gr.

12. august fingu Irena Dalá og Signar Holm, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3000 gr.

13. august fingu Joan Andreasen og Jens Pauli Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3850 gr.

13. august fingu Joan Langgaard og Gert Heinesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3700 gr.

14. august fingu Sólrun Gleðisheygg og Regin Joensen, Argir, ein son. Hann var 60 cm. og vigaði 4450 gr.

16. august fingu Karolina Jacobsen, Klaksvík og Áki Joensen, Miðvágur, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3600 gr.

16. august fingu Karina Abelsen og Jan Høghamar, Eiði, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3700 gr.

18. august fingu Hanna Vang og Georg Kjærbo, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3300 gr.

18. august fingu Haldis Johnsdóttir, Skála og Kenneth Carlsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3300 gr.

18. august fingu Rannvá og Jan Petersen, Saltnes, tvíburar, gentu og drong. Gentan var 47 cm. og vigaði 2550 gr. og drongur var 49 cm. og vigaði 2600 gr.

18. august fingu Daniella Andreasen, Tórshavn og Óli Olsen, Skála, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3650 gr.

19. august fingu Katrin B. Poulsen, Klaksvík og Terji Nýggjagarð, Hvannasund, ein son. Hann var 47 cm. og vigaði 2140 gr.

19. august fingu Jana Egholm og Ole Anderson, Sørvágur, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3750 gr.

19. august fingu Fríðbjørg Joensen og Gunnar Waagstein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4075 gr.

20. august fingu Joan og Jaspur Tausen, Agnið Nes, eina dóttur ið eigur Louisa. Hon var 49 cm. og vigaði 2475 gr.

20. august fingu Sunneva og Jack Mohr, Lambi, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4200 gr.

20. august fingu Jóna og Vinjard Guttesen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4270 gr.

20. august fingu Annika og Ingi Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3500 gr.

## Andlát

**15. august**
Richard Johannesen, Sandavági, 80 ár
**17. august**
Dánjal á Steinum, bóndi á Velbastað, 71 ár
Davina Bjørnoy, fødd Olsen, ættað úr Árnafirði, búsitandi í Noreg, 73 ár
**18. august**
Ásmundur Hansen, leirvík, 79 ár
Jóhan Olsen, Rituvík, fyrrverandi sjómanstrúboðari, 80 ár
**19. august**
Jóhannes Poulsen á Válinum, Vestmanna, 84 ár
Paulina Thomsen, Hvalba, 89 ár

# 60 ár við saksinum



*Her situr ein av føstu kundumum, klaksvíkingurin Frimann Baldvinson, í stólinum hjá Esklid, hann sigur, at ongin annar enn Eskild hevur klipt sær*

Í morgin, 24. august, eru 60 ár liðin, síðani Eskild Norðbúð í Klaksvík fór undir handverkið, sum hann framvegis fæst við. Bartalsmessuvalið, plagar at verða tikið til, tá ið tosað verður um løgtingsvalið 24. august í 1943. Henda dagin lat Eskild Norðbúð klippistovu upp í Klaksvík. Hann hevur klipt síðani, og hóast hann nú er 82 ára gamal, og hann kanska ikki er so títtur við saksinum, sum hann onkuntíð hevur verið, so eru teir fleiri – nú eru tað bara menn og serliga úr eldra ættarliðnum – sum Eskild syrgir fyri eru snøggir um høvdið. Eitt skifti í sjeyti og áttati árunum dreiv miðlingasonurin salongina, meðan Eskild fekst eitt nú við at selja mannfólkaklæðir, men hann var altíð klárur at tørna til, tá nógv var at gera, og nógvu tey seinnu árini hevur tað aftur verið Eskild, sum hevur havt salongina.

Eskild lærdi til hárskera fyrrapartin undir krígnum hjá Valdemari Poulsen í Havnini. Tá ið Eskild lat upp í Klaksvík, var tað í kjallaranum hjá Símuni Andreasen, Símuni hjá Hildu, í Akursmørk. Í 1945 flutti hann út í kjallaran hjá Eriki Lassen, Eriki hjá Gudda, í Víkunum, og í 1948 flutti hann klippistovuna í húsini, sum hann og konan høvdu latið byggja við sandin heimanfyri á Fornagørðum. Tey seinastu fimtan árini ella so hevur Eskild klipt í húsunum, sum tey fyri út ímóti fjórðingsøld síðani lótu byggja undir Brúnni.

Eskild plagar at siga, at tað tók drúgva tíð at venja klaksvíkingar, norðoyingar og hinar kundarnar við, at nú skuldu teir fáa klippingina frá hondini, meðan tað var dagur. Frammanundan hevði tað verið vanligt, at onkur tók sær av hesi uppgávuni heima við hús, og tá gekk tað fyri seg um kvøldarnar. Eftir fimtan árum hevði Eskild barberurin, sum hann varð nevndur, eins nógv at gera fyrrapartarnar og seinnapartarnar.

Eskild er klaksvíkingur. Í 1947 giftist hann við Poulinu, sum var ættað av Sandi. Tey fingu tríggjar dreingir: Jógvan, Anfinn og Sjúrð. Jógvan og Sjúrður búgva í Havnini og Anfinn býr í Hirtshals. Tað var dyggur smeitur hjá Eskildi, tá ið hann í 1990 misti konuna, sum hevði verið honum ómetaligur stuðul, og sum var miðdepulin í hugnaligum heimi, har nógv vitjaðu. Men Eskild lærdi seg at liva við dygga stoytinum, hann er framvegis aktivur, hóast hann er farin um kempualdur, og í morgin hevur hann verið barberur í Klaksvík í 60 ár.

## Axel Olsen 90 ár



Mánadagin 25. august fyllir Axel Olsen á Toftum 90 ár. Axel er toftamaður, foreldrini vóru Elisabeth, f. Hansen, úr Túni, og Guttorm Olsen, av Regni, bæði av Toftum.

Axel er útbúgvin motorpassari, hevur siglt sum motorpassari og havt bát sjálvur. Hann hevur róð út og siglt við fólki og frakt millum Toftir og onnur pláss í Føroyum. Eisini hevur hann havt egnan hýruvogn. Hann var í mong ár røktingarmaður á Mýrunum við Toftavatn og í Svínáum. Hetta starv røkti hann til fyri fáum árum síðan. Hóast høgan aldur koyrir hann enn bil og er livandi áhugaður í tí sum fyriferst í samfelagnum.

Axel giftist í 1935 við Nannu, f. Højgaard, av Toftum, og tey fingu fimm børn. 22. oktober í 2000 kundu tey halda krúndiamantbrúdleyp, tá tey høvdu verið gift í 65 ár. Nanna andaðist 10. apríl 2003, 87 ára gomul.

Tey munnu vera fleiri, sum komast við, tá ið nevnt verður at Axel, fyri eini 10 árum síðan í fleiri sendingum í útvarpinum, nágreiniliga og hugtakandi greiddi frá pørtum av sínum langa lívi.

90 ára føðingardagurin verður hildin sunnudagin 24. august á Svangaskarði, har høvið verður at heilsa uppá Axel frá kl. 17-21.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Høgni Jøkladal 75 ár



Fríggjadagin hin 22. august fylti Høgni Jøkladal 75 ár. Høgni var borin í heim í húsunum hjá Malenu og Hans Hansen, vanliga nevndur Hans á Lakjuni, ið var farbróðir hansara. Høgni er sonur Mariu og Óla Jøkladal í Fuglafirði.

Sum 14 ára gamal fór hann á sild við »Vón« hjá Sigurdi Simonsen, og var hann burtur eina tíð við ymiskum skipum. Hann fór so í læru sum rørleggjari hjá Alex Sevdal, og lærdi fyrst har í tvey ár, og tók so tey seinastu tvey árini av lærutíðini hjá Meka í Fuglafirði. Eftir lokna lærutíð tók hann tað teir róptu »maskin og motor«, og sigldi hann eina tíð sum maskinmaður við »Norðheim«, »Norðberg«, »Krossteini« og »Boðasteini«, til hann í 1955 fór á maskinmeistara skúla í Klaksvík. Høgni sigldi úti í verðini eina tíð hjá ØK og hevur millum annað eisini arbeitt hjá B&W í Keypmannahavn.

Tá ið fuglfirðingar lótu »Ólav Halga« byggja, vóru boð eftir Høgna, og var hann við har í 12 ár sum maskinstjóri.

Høgni var smiðjumeistari hjá Meka tey fyrstu árini, eftir at hann var givin á sjónum. Hetta starv røkti hann, til hann yvirtók landingina av skipum, ið komu við fiski til Havsbrún. Í hesum starvi kenna mangir sjómenn hann frá, tá teir eru komnir við skipum til Havsbrún. Høgni hevur verið ein sera íðin og dugnaligur maskinmaður, og hevur verið sera raskur, til hann í ár legði frá sær og hevur selt lossiamboðini til Havsbrún.

Høgni kom til persónliga trúgv á Harran sum ungur, og hevur hann ongantíð skammast við at vitna um Hann. Hansara partur hevur heldur ikki ligið eftir, tá ið tað hevur snúð seg um arbeiðið í Siloa. Serliga var hann sera virkin, tá ið núverandi salurin varð bygdur. Høgni er giftur við Margit, og eiga tey børnini Mariu, Karl, Óluvu og Fríðu.

Vil bara runda av við at ynskja tær alt tað besta, og mátti Harrin signað lívskvøld títt.

**HS**

## Niclas Jespersen 85 ár



Leygardagin 23. august fyllir Niclas Jespersen í Havn 85 ár. Niclas er hvalbingur. Foreldrini vóru Maria, f. Hovgaard, úr Hovi, og Mortan Jespersen, úr Hvalba.

Sum ungur fór Niclas til Danmarkar á háskúla. Í februar í 1941 varð hann settur í starv sum eykapolitistur í Danmark og tvey ár seinni á fast starv. Hann var politistur í ymsum støðum í Danmark til 1. mai 1948, tá hann søkti um farloyvi. Í Danmark møtti hann Grethe, f. Petersen, úr Dragstrup í Norðursælandi, og giftust tey í 1942.

1. oktober 1949 varð hann settur kommunalur politistur í Havn. Stutt tíðarbil var hann politistur á bygd, hann var t.d. í Hvalba, Runavík og í Klaksvík. 1. september 1981 fór hann frá fyri aldur, men var eykapolitistur í fýra ár eftir tað. 1. september 1985 fór hann endaliga úr starvi, 67 ára gamal.

Tey flestu minnast tær sera væl umtóktu barnasendingarnar í SVF um dólgarnar, sum Zacharias Hammer skipaði fyri, har Niclas var politistur. Sendingarnar vóru eins væl umtóktar av vaksnum sum børnum.

Niclas hevur stóran áhuga í og hevur fingist nógv við ættargransking.

Grethe og Niclas eiga fýra børn: Sverri, sum býr í Svendborg, Solveig, sum býr í Fåborg, og Lars og Karin, sum búgva í Havn.

Føðingardagurin verður hildin í heiminum í Lykkjugerði í Havn millum kl. 10-13.

## Oddur Heinesen 60 ár



Mánadagin 25. august fyllir Oddur Heinesen í Saltangará 60 ár. Oddur er føddur og uppvaksin í Kunoy, hann er sonur Jensu Mariu, f. Ennistein, og Jens Richard Heinesen úr Kunoy.

Sum ungur kom Oddur til Havnar, har hann lærdi til bakara hjá Alexander Hansen, vanliga nevndur Alli.

1. juni 1970 fekk hann starv sum bakari á bakaríinum hjá Hallgrím Miðberg í Saltangará, og er hann framvegis á sama arbeiðsplássi. Í 2000 kundi hann halda sín 30 ára starvsdag. Hann hevur verið álitið á bakaríinum øll árini.

Oddur hevur góðan hug til at arbeiða í urtagarðinum, hann hevur havt seyð á Nesi, og um summarið er hann ofta í Kunoy og hoyggjar.

Hann er giftur við Eyðbjørg, f. Hansen, ættað av Nesi, tey eiga synirnar Jákup og Richard.



*Eftir lokið prógv sum »Kandidat í akvakultur« í Noregi hevur Leif av Reyni fullført útbúgvingina »Master in Aquaculture« á Stirling University í Scotlandi.*

## Stephania Trónd Thorsteinsson 25 ára starvsdag



*Í sambandi við starvsdagin fekk Stephania eina mynd av gamla handlinum hjá Trónd Hansen á Áarvegnum*

Hósdagin 21. august hevði Stephania Trónd Thorsteinsson 25 ára starvsdag í Føroya Banka í Havn. Hon byrjaði sum bankalærlingur 21. august 1978 í Føroya Banka í Niels Finsensgøtu.

Stephania er dóttir Annu, f. Haraldsen, ættað úr Miðvági, og Sverra Trónd Hansen í Havn. Hon er gift við Anfinni Thorsteinsson úr Klaksvík, børnini hjá teimum eru: Anna, Ólavur Sverri og Guðfinnur.

Stephania arbeiðir í dag á fyrisitingardeildini í Føroya Banka.

## Dagurin

**23. august. Sakeus,** deyður í umleið ár 116. Í elsta listanum yvir biskupar í Jerusalem verður ein Sakeus, sum er tann fjórði í tí biskupatalinum, men annars ókendur. Summir halda, at her verður sipað til yvirtollaran Sakeus (Luk. 19, 1-6).
Hundadagar enda.
Navnið merkir *reinur* ella *sakleysur.*

**24. august. Bartalsmessa.** ella *bartalsøka.* Til minnis um lærusveinin Bartolomeus. Halgisøgan sigur, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór hann eystureftir til Armeniu, Mesopotainu og Indiu, har hann varð tikin av døgum av uppøstum avgudaprestum.
Í træskurðinum á einum av kirkjubøstólunum sæst hann við kvívi í hendi, ið sipar til, at hann varð flettur livandi.
Navnið merkir sonur *Ptolemeusar*.
24. august 1943 var eitt løgtingsval, sum varð rópt *bartalsmessuvalið.*

**25. august. Ludvík.** Deyður í 1270. Kongur í Fraklandi, nevndur Ludvík hin Heilagi. Stóð á odda fyri fleiri krossferðum. Á einari ferð til Norðurafrika doyði hann av sjúku.
Upprunaliga germanskt navn, ið merkti *viðgitin* og *stríð*.

## 90 ÁR

Mánadagin 25. august fyllir Axel Olsen á Toftum 90 ár. Føðingardagurin verður hildin sunnudagin 24. august á Svangaskarði, har høvið verður at heilsa uppá Axel frá kl. 17-21.

## PRÓGV

17. juni tóku Brynhild Høyer f. Olsen og maður hennara Rasmus Høyer prógv sum Cand. Merc. á Handilsháskúlanum í Århus.